VIÐMERKINGAR

Samband má vera!

Heðin Mortensen,
løgtingsmaður

Saman at halda var ei okkum givið,
tí er so lítið burturúr her blivið;
tí enn vit tala, men ov lítið gera.
Samband má vera!

Eg havi loyvt mær at broytt síðstu regluna í hesum ørindinum hjá Hans Andriasi Djurhuus. Hann skrivar, at samhald má vera. Men samhald og samband eru tvær síður av somu søk. Føroyingar hava ein tryggleika og eitt samhald í ríkisfelagskapinum, sum gevur okkum einanstandandi fortreytir fyri at skipa eitt trygt, ríkt og gott samfelag fyri øll í hesum landinum.

Men, sum Hans Andrias sigur: saman at halda var ei okkum givið. Vit klandrast, slítast og bítast um smálutir. Vit kjakast ár um ár um vit skulu fáa nakað av skafti í ríkisfelagsskapinum, ella vit fyrst skulu fara úr ríkinum.

Við hvørt kundu vit ynskt okkum hasa fólkaatkvøðuna, so vit kundu sett propp í fullveldismálið og farið undir veruliga at byggja land. Samtykt eina nýggja stýrisskipanarlóg, bygt eldrabýlið og barnagarðar. Privatisera almennar fyritøkur, men samstundis økt almenna virksemi á trivnaðarøkinum. Rationalisera almenna bygnaðin, lætt um skattabyrðuna og endurnýggja búskapin.

Hoydal og Eidesgaard tola ikki hvønn annan, samstundis sum bæði sambandsmenn og tjóðveldismenn meta samband og loysing sum trúðarspurningar. Hetta merkir, at ongin breið samgonga er møgulig í Føroyum í dag. Líkamikið hvat vit velja, so eru næstan líka nógv ónøgd sum nøgd, og áðrenn nøkur loysn er framd, ja so er helvtin lopin frá aftur.

Sambandshøvdingin Rasmus Effersøe yrkti um ein av teimum farnu sjálvstýrishøvdingunum sangin "Fast stóð í fonnum eitt fjalladalsfylgi". Fast standa vit nú, tað føroyska fjalladalsfylgið. Vit eru øll samd um, at vit eiga sjálvræði, og at vit eiga at ganga ta leið, sum gevur grønastu líðirnar at ganga í. Men tey flestu hava onga ørandi tráðan eftir at sleppa oman í annað lendi alt fyri eitt.

Við hvørt steingjast ræsurnar, og við hvørt tánar so frægt, at gongt aftur er. Vandin er altíð, at eitt politiskt stórdýr loypir á skalvin og fær alt fylgi eftir sær oman í ta glerstoyttu skor. Vandamálið er, at hetta lítla fylgi í fonnini slotar hvør sín veg burtur úr kavanum. Hvørjum skulu føroyingar trúgva, og hvørjum skulu vit fylgja?

Tann politiski slóðarin, umenn hann er ikki so væl holdaður, vil hava okkum at loypa út í ein glerskalv. Aðrir vilja heldur loypa hendavegin ella handavegin, men fáir vilja fara undir at slóða eina gongda leið. Tann gongda leiðin krevur nógva slóðan, og er heldur longri at ganga, men hon er tryggari og kann sameina okkum.

Tí henda áheitan á føroyingar, áðrenn vit leypa útav og týnast sum slóðarin reysti:

Tann sum vil framá, hann gloymi tí ei sjálvur sær slóðir at bróta.

Velja vit eina føroyska loysn, ja so slóða vit okkum eina lagaliga gøtu, sum snýr seg spakuliga ígjøgnum vallingarnar uttan at taka nøkur óráð fyri. Sambandsmenn mugu ganga við uppá, at gøtan leiðir fram at fullveldisfløttinum. Men tey sjálvstýrissinnaðu mugu viðganga, at tað er fult út demokratiskt og loyviligt at stegða á áðrenn fullveldi og velja eina skipan við sjálvræði innan fyri ríkismarkið.

Fyri Føroya fólk vóni eg, at vit í Sambandsflokkinum saman við øðrum flokkum í eini breiðari semju kunnu vísa á skilagóðar og tryggar slóðir ígjøgnum kava og gler, sum geva úrslit og trivna og avrik. Vit kunnu tá gevast við keglinum og grenjinum og persónliga klandrinum.

Samhald má vera!

Vøkur tónleikaløta í Vesturkirkjuni

UMMÆLI
Ólavur Hátún

Seinasta sunnudag bjóðaðu Nes Sóknar Musikkfelag og Harmoniorkestrið GHM til konsert bæði í Fríðrikskirkjuni og í Vesturkirkjuni.

Mær bar tað til at hoyra konsertina í Havn, og lat tað verða sagt beinanvegin, at hetta gjørdist tónleikaløta, sum tú komst heimaftur frá við ríkaðum sinni.

Martin Mouritsen var leiðari hjá báðum orkestrunum, og hjá honum vita tónleikararnir seg at vera í tryggum hondum. Nes Sóknar Musikkfelag legði fyri, og beinanvegin varnaðist tú aftur, hvussu hábærsliga málmklangurin hóvar í einari kirkju. Sum tann góði musikkuppalarin Martin er, havði hann í vekir ans fyri góðum ljómi, og tað er besta grundstøði hjá einumhvørjum ljómliði til framhaldandi menning. Samanumtikið upplivdi tú her eina cantabile løtu við tilkomnum og ungum spælarum, sum gevur góðar vónir fyri framtíðini hjá Nes Sóknar Musikkfelag.

Ein fyribils hæddarløta var tað, tá ið bæði orkestrini síðan spældu saman. Ljómurin vaks í sínum veldi og gjørdist enn ríkari, tá ið træblásararnir komu uppí.

Tú upplivdi her eisini, hvussu væl Vesturkirkjan er egnað til størri kirkjuligar tónleikaframførslur, so rúmsáttur kórparturin er.

Yndisligt var at líta og lýða á, tá ungu systrarnar Durita og Birita Lamhauge Jóansdøtur spældu Haydntrio fyri tvær floytur og bassklarinett saman við floytulæraranum Katju Volovelskaja. Harmiligt fyri Bartal Nolsøe Poulsen at honum vegna sjúku skuldi berast frá at spæla aðra floytuna. Hinvegin var tað at frøðast um, hvussu lærarar og næmingar á hesari konsert vóru felags um at fremja tónleik á høgum stigi. Millum tey ungu í GHM sat Kenneth Jones, sum í góðari samvinnu millum musikkskúlan, Harmoniorkstrið GHM og Havnar Hornorkestur skapar nýtt støði til tað slóð, sum landsmenn hansara fyri honum hava lagt í tónleikalívið í Havn. Eisini er at nevna klarinettlæraran Peder Riis-Jensen, sum stuðlandi fyri sínar næmingar sat í frammaliga í kirkjuni. Ikki er heldur at forgloyma floytulæraran Andreu Heindriksdóttir, dagligur leiðari hjá GHM, sum hesaferð vegna gleðiligar umstøður hevði latið starvsfelaganum Martini dirigentpinnin burturav.

Tað er ikki mín søk so nágreiniliga at ummæla orkesturtónleik; men eg hugsi, at eisini tey, sum eru meira før á hesum øki, mundu taka undir við mær í teirri meting, at so vælljómandi og musikalskt gjøgnumført orkesturspæl, sum GHM framdi sum seinasta tátt í hesari konsert, hevur sjaldan verið at hoyra her á landi. Martin Mouritsen er tann føddi orkesturleiðarin. Við lítillátnum lótum og tó við myndugleika fær hann latið upp fyri tónleikinum og samansjóðað sína sannføring við við teir møguleikar, sum tey leikandi bera í sær. Mær rann løtan í huga, tá Martin við sínum 65-manna Føroya Ungdómsharmoniorkestri bergtók teir túsund áhoyrararnar á norðurlendsku musikkskúlaorkesturstevnuni í Kolding á sinni. Hevði tað verið eitt tátt at tikið uppaftur í musikkskúlans arbeiði.

Men tá nú alt var so væl úr hondum greitt til hesa konsert, mátti tú undrast á, at so óskettið var farið um prentaðu skránna. Lagið til "Nú hvítna tindar fjøllum á" gjørdi danska tónaskaldið J.H. Nebelong og hildið, at slíkt samanspæl, har landsins mest framkomnu ungu blásarar fingu høvi til í felag at menna seg og at fremja tónleikalig avrik, sum tey flestu annars ikki hava høvi til, mátti verið ein táttur at tikið uppaftur í musikkskúlans arbeiði.

Men tá nú alt var so væl úr hondum greitt til hesa konsert, mátti tú undrast á, at so óskettið var farið um prentaðu skránna. Lagið til "Nú hvítna tindar fjøllum á" gjørdi danska tónaskaldið J.H. Nebelong og "Eitt lítið fjallaland", og lagið til "Mítt føðiland" er ikki eftir Hans J. Højgaard, men Petur Alberg. Endamálið við skránni er jú at vera áhoyrarunum til upplýsingar og skapandi listafólkunum til viðurkenningar; tí má tann lítli parturin í fyrireikingunum vera í lagi.

Men tónleikaløtan í Vesturkirkjuni hetta sunnukvøldið 18. mars verður tó sitandi í sinninum sum ein sera vøkur uppliving.



VIÐMERKINGAR

Hitt musikalska móðurmálið

Eitt aftursvar til Ólav Hátún

Eyðun Andreassen



Góði Ólavur! Tú hevði nøkur orð til mín um ein fyrilestur, ið seinni varð prentaður í Skáanum. Tú mást orsaka, at tvær vikur eru gingnar. Eg ætlaði alla tíðina at svara tær, og so kom okkurt í vegin. Men her kemur so svar mítt. Alt ov stutt til eitt so viðkomandi evni, men langt kann eisini vera ov langt.

Tær dámdi ikki sumt, eg hevði frammi í grein míni Kristindómur og kvæðayrking í Skáanum fyri stuttum. Har vísti eg á, at hitt gamla føroyska kvøðingar- og sanglagið var fyribeint sum úrslit av einum medvitnum virki innan kirkju og skúla. Víst var tað hetta sum hendi, Ólavur, og tá tú mótmælir, gert tú tað móti betri vitandi. Hví tú ger tað, kann eg bara gita um, men onkrar grundir manst tú hava.

Tú av øllum lærarum í Føroyum veit, at føroyskur dansur ofta við harðrendari hond varð útihýstur úr føroyskum skúlum víða um landið. Hevur tú gloymt tað? Og hetta sigur tú vera ein høpisleysan pástand hjá mær? Ert tú blivin so gloymskur, ella hevur tú onnur ørindi??

Føroysk musikkfrálæra hevur ongantíð lagt seg eftir tí føroyska tónleikinum. Her nevndi eg undangongumenn sum Jógvan Waagstein og Hans J. Højgaard. Teir dugdu ikki at kvøða og dansa, og løgdu heldur einki í tað. Eg segði einki um, hvat hesir báðir hava gjørt, og hvat hevur verið gjørt í føroyskum musikkpedagogikki. Nógv gott og positivt kann skrivast um tað. Eg nevndi, hvat ikki hevur verið gjørt! Og tað er eisini útslit av medvitnum vali. Er tað ikki so?

Eg skrivaði, at kirkjuorglini beindu fyri tí gamla sang og kvøðingarlagnum í Føroyum. Eisini hetta sigur tú vera ein høpisleysan pástand, og eg spyrji meg sjálvan, um tú ert vorðin tónadeyvur. Sjálvandi ert tú ikki tað, men hvørji eru so ørindini hjá tær? Tú skrivar: »At greipa kingosang og kvøðing soleiðis saman, og leggja orglunum til last, at kvøðingarlagið skal vera farið av lagi, tað er tað ikki grundarlag til.« Feilurin við tær og øðrum musikkpedagogum er, at tit hava eitt klaviatur skorað fast millum oyruni, og at allir teir tónar, tit hoyra, men sum ikki passa á klaviaturinum verða útreinsaðir. Hetta veitst tú, og tó fært tú teg til at siga ein setning sum handan. Lat meg siga tær eina søgu um hetta. Eg hevði mín fyrsta sangtíma, tá eg sum 11 ára gamal kom til Havnar at ganga í skúla. Lærarin var Hans J. Højgaard. Í fyrsta tímanum læt hann okkum syngja eitt ørindi úr einum sangi. Eg valdi Tá eg verði stórur. Hetta var stuttligt, men stór var undranin, tá eg og onkur onnur børn fingu tey boð, at vit ikki skuldu koma aftur til sangtímarnar. (Og tað var ikki av tí grund, at eg var farin at gala enn). Tí havi eg bara havt ein einasta sangtíma í tí nýggju, stásiligu sangstovuni í tí nýggja Tórshavnar Kommunuskúla, ið var tikin í nýtslu júst hetta árið, í 1956.

Árið eftir fór eg í millumskúlan, og sanglærarin nú var Poul Eide. Hann gjørdi tað sama sum Højgaard. Allir dreingirnir skuldu syngja ein sang einsamallir. Hesuferð valdi eg Í Vesturhavi har liggur eitt land. Tá allir høvdu sungið, segði Poul Eide, at teir tríggir bestu skuldu fáa premiu. Tá hann kom yvir til borðið hjá mær, visti eg, at søgan fór at endurtaka seg frá árinum fyri. Eg hugdi ikki upp og ivaðist ikki í, at hann vendi sær til onkran annan við borðið, men ovfarin kendi eg so, at hann legði eitt yankie bar í hondina á mær. Tað var onnur premia! Sum tú veit, hava báðir hasir sangirnir vísuløg, og eg hevði kvøðið!! »Hatta var gott at hoyra,« segði Poul Eide.

Í grein míni nevndi eg síðani, at tað undrar meg, at vit bæði hava ein 130-ára gamlan læraraskúla og ein landsumfatandi musikkskúla, ið hvørgin arbeiðir við hesum føroyska tónleikinum. Aftur her: eg segði einki um, hvat gjørt verður á hesum skúlum, einans hvat ikki verður gjørt! Og tað er eisini við vilja, tað ið ikki verður gjørt. Eg veit væl Ólavur, at tú altíuð hevur havt áhuga fyri dansi og kvøðing, men er hetta ein lærugrein á læraraskúlanum og í musikkskúlanum? Eg eri sjálvur lærari og av lærarafólki. Abbi mín í Havn var lærari, bæði foreldur míni vóru lærarar . Tá lærdu lærarar at spæla orgul og violin og sang. Í prógvið fingu teir hesa viðmerking: »Kan forestå kirkesang!« Og summir helst, at hetta virki kundu teir ikki átaka sær. Tað var endamálið við undirvísingini. Tú spyrt, hvat eg veit um musikkundirvísingina á læraraskúlanum, og nevnir Árna Dahl. Kenni eg ikki Árna Dahl og hansara megnarvirki á so mongum økjum? Jú víst, men eg veit eisini, at hann er ikki musikklærari!! Í staðin fyri ella kanska aftur orglinum og violinini læra næmingarnir vist heilt nógv at spæla gittara og onnur instrument, sum teimum hóvar. Tey læra helst eisini bæði um »klassiskan« tónleik og um tann rútmiska. Men framvegis er eingin musikklærari, ið kann hava føroyska tónleikin sum fak. Og fyri ikki at gera nakran firtnan, so ivist eg ikki í, at tann tónleikafrálæra, ið verður givin, er góð. Eg tosa bara um ta, ið ikki verður givin. Og hvussu mangir lærarar í tí føroyska musikkskúlaverkinum geva frálæru um henda tónleik, eg skrivi um?

Tú hevði ein ávísan polemiskan tóna í tínum svari til mín, og tí fært tú aftursvar í sama tónalag. Men tá eg vil fara aftur um tað, so vóru míni ørindi at siga frá einari undran um, hvussu tjóðskaparrørslan og yrkjararnir tá, tóku alt hitt føroyska fram í sínum skaldskapi at lovprísa, men gloymdu hitt føroyska musikalska móðurmálið. Eg nevndi Jóannes Patursson sum eitt undantak millum tjóðskaparskøldini, tí hann so væl og medvitið valdi sær føroysk kvæða- og vísuløg at yrkja til. Tú spyrt, um eg havi gloymt allar hinar so sum IPG, Kvívíks Jógvan, Mikkjal á Ryggi, Andras Samuelsen, S. M. Zachariasen og fleiri. Hyggur tú í Songbók Føroya Fólks, so finnur tú ein og annan sang hjá hesum og øðrum yrkjarum, ið eru gjørdir til føroysk løg. Ein, tveir og kanska tríggjar. Jóannes Patursson hevur fimtan! Og hann hevði ikki verið á donskum fólkaháskúla! Og eg klikki ikki niður á danskar fólkaháskúlar, men undri meg, hvussu kopierandi yrkingarlagið mangan er í tjóðskapartíðini: Tann kopieraði hevur ikki skyldina av at verða kopieraður. Tann nýggja føroyska mentanan varð framborin á donskum (og øðrum) tónamáli. Føroyingar fóru at syngja um hitt føroyska á málinum hjá Hans Arvesen og hinum donsku og norðurlendsku tónaskøldum. Jóannes Patursson gekk eina aðra leið. At hetta skal vera at klikkja niður á nakran, er tvætl! Tað var bara so.

Hetta landið yðjur av musikarum, ið kopiera annan tónleik. Ein maður í týðandi starvi innan føroyskt tónleikalív greiddi í útvarpinum í morgun frá, hvussu teir strevaður vit at fáa eitt lag hjá einum amerikanskum rokkbólki at sita í teirra egna orkestri. Er eingin kreativitetur til innan tónleikin, spurdi eg meg sjálvan. Um so er, so er her ein stór uppgáva har hjá musikkpedagogunum. Til seinasta Prix Føroyar varð eitt dómaralið uttanífrá boðsent at gera metingar um føroyska tónleikastigið. Teir spurdu undrandi, um ikki ein einasti tóni var til í Føroyum, ið kundi takast upp í og hoyrast aftur í allari hesi kopieringini. Støðan er tíverri tann, at fert tú til ein ungan ella hálvgamlan rokkara í dag, og spyrt eftir einum føroyskum tóna, so stendur hann sum kánus fyrst, og heldur teg vera býttan. Síðani fer hann at flenna. Og tað má for hundan hava okkurt við tónleikafrálæruna onkustaðni at gera.

Her á landi hava vit tíverri, og sum ikki einaferð, sett danskar standardir, og adopterað danska hugtakið fólkamusikkur, ið sostatt er komið at merkja eina amerikanska musikkgenru. Í hinum Norðanlondunum merkir fólkamusikkur teirra egni musikkur. Vit hava ein heilan Jazz- fólka- og blues festival á hvørjum ári, har orðið fólkamusikkur merkir hetta slagi av amerikanskum (og donskum) musikki. Tann egna og tann veruliga fólkamusikkin kalla danir helst etniskan musikk. Tað havi eg hoyrt nevnt her í Føroyum eisini um kvøðing. Og undarligt er tað í mínum oyrum, tá fólk fara at nevna seg sjálvi við heitinum etnisk!

Einastaðni fert tú yvir um mark, Ólavur. Tú leggur meg undir at háða dansifelagið Tøkum lætt, har eg skrivaði, at eg meira hoyrdi kvøðingarkór enn føroyskan dans á upptøkum nú í tíðini. Eg hevði ikki serstakliga dansifelagið Tøkum lætt í huga. Eg hevði tað í huga, at við tíðini gerst næstan allur føroyskur dansur til kvøðing í kóri. Dansifólkið byrjar ørindi, næstan áðrenn skiparin fær høvi at skipa. Hann eigur fáa høvi til at ráða dansinum eftir egnum tykki, men skipingin verður tikin av honum, og hevur tú ikki eisini mangan upplivað, at um skiparin steðgar á eitt bil, heldur restin av dansifólkinum fram at kvða, sum um hann ikki var til? Hetta lærdu abbar og ommur tey ungu fyrr í tíðini. Nú er eingin at læra tey ungu slíkt og mangt, mangt annað í hesum musikkinum. Kann tað vera tí, Ólavur, at her kundi verið brúk fyri einum lærara. Til dømis einum musikklærara?

Men teir,ið nú virka, kunna ikki brúkast til hetta. Tað er so sikkurt og vist. Hvussu undirvísast skal, spyrt tú. Man ikki bera til at undirvísa í øllum sløgum at musikki? Í Kaustinen í Finnlandi og á Voss í Noreg verður frálæra givin á hægsta stigi í fólkamusikki. Við Musikkháskúlan í Oslo er sjálvur Sven Nyhus professari í fólkamusikki. Alla staðni bæði teoretisk og praktisk frálæra. Runt um í Svøríki verður somuleiðis frálæra givin í musikkskúlunum eisini í fólkamusikki. Hevði tað verið eitt hugskot at gjørt eina ferð til hesi støð? Um vitan, vilji og hugur var, vildi eg hildið tað kundi borið til! At frálæra kundi verið eisini í føroyskum fólkamusikki.

At enda í grein tíni gerst tú heldur patetiskur: Tú spyrt meg: »Hvussu kann mentamaður sum tú avdúka slíkan sjónarring, at vit ikki á besta hátt skula útbúgva okkum til at taka við tí ríkidømi, sum vesturlendski tónleikaarvurin er? (...) Og hvussu hevur tú, Eyðun, sum alternativ til almennu tónleikamenningina hugsað tær at hava skeið fyri føroyingar í, hvussu vit hava sungið og kvøðið her?«

Ikki havi eg grett eitt einasta orðið um, at vit ikki skula taka við vesturlendska tónleikaarvinum. Hvat meinar tú? Eg sum eru Schubert elskari? Men hvussu kunna vit taka við annans arvi, tá vit hava koyrt okkara egna arv fyri bakka??

Føroyingar eru europearar, og okkara mentan er partur av europeisku mentanini. Har áttu vit at verið samdir. Men so skiljast helst okkara meiningar. Eg havi tað sjónarmið, at vit ikki einans skula taka við europeiska tónleikaarvinum, sum tú málber teg, men at vit eisini áttu (og eiga) eitt íkast at lata til henda arv. Føroyingar hava nakað at leggja aftur at europeiska mentanararvinum. Vit hava bara ikki viljan, ella heldur dirvið, at gera tað! Tá er tað tryggari bert at taka ímóti. Eg spyrji: Er tað tí, at tað er skomm at vera føroyingur? Ella kanska ikki nóg fínt?